M
E
N
T
A
M
Á
L
A
R
Á
Ð
I
Ð

# FÓLKASKÚLIN

## FØROYSKT
## 10. FLOKKUR

Týsdagin 26. mai 2015

kl. 14.30 - 18.30



Mynd: Gulakur Zachariasen

Loyvt er at nýta hjálparmiðlar

## Vel eitt av hesum evnunum og skriva um tað:

**1. Stórasystir** ................................................................................ s. 4

- Greina og tulka myndina
- Sig søguna, sum tú sært í myndini

*Yvirskrift*: *Stórasystir*

**2. Klædnastílur** ................................................................................ s. 5

- Ger viðmerkingar til viðtalið
- Eru aðrir spurningar, ið tú kundi hugsað tær at sett Katju?
- Hugleið um evnið klædnastílur.
  Tak m.a. hugtøkini endurnýtsla, merkjaklæði, bólkatrýst og mótarák við í tínar hugleiðingar
- Hví munnu nógv ung fólk – bæði gentur og dreingir - velja at ganga í endurnýtsluklæðum? Og man munur vera á klædnastíli á bygd og í Havn?
- Hvørjir fyrimunir og vansar eru við at brúka endurnýtsluklæði?

*Yvirskrift*: *Klædnastílur*

**3. Ein heldur stutt stuttsøga** ................................................................ s. 6-7

- Greina og tulka bloggin *Ein heldur stutt stuttsøga...*
  Sig tína hugsan um bloggin og um evnið
- Hvat heldur tú um yvirskriftina?
- Sig tína hugsan um tekstaslagið, og hugleið um, um nógv lesa slíkar bloggar

*Yvirskrift*: *Ein heldur stutt stuttsøga*

**4. Býarmyndir** ................................................................................ s. 8-9

- Greina og tulka yrkingina *Ishøj in memoriam*
- Sig í stuttum, hvat teksturin ”Býarmyndin” er um. Hvat leggur høvundurin serliga dent á?
- Skriva hvørji serlig eyðkenni eru í báðum tekstunum
- Heldur tú, at samfelagið ger nóg mikið til tess at hjálpa fólkum, ið koma soleiðis fyri sum persónarnir í hesum báðum tekstunum? Grundgev!
- Um tú hevði møguleikan, hvat hevði tú gjørt, sum kundi bøtt um støðuna hjá hesum fólkum?

*Yvirskrift*: *Býarmyndir*

**5. Vitjið Føroyar** ........................................................................ s. 10

- Greina og tulka filmin
- Sig tína hugsan um filmin og hugleið um, hvønn týdning slíkir filmar hava

Í tíni viðgerð skalt tú m.a. hugsa um:

- hvat endamálið er við filminum
- hvør er sendari og móttakari
- hvørjar søgur filmurin lýsir
- hvussu huglagið er
- hvussu tónleikur verður nýttur í filminum
- hvørjar málsligar snildir vera nýttar
- hvussu myndir og tekstur samsvara
- hvussu filmurin røkkur sínum endamáli

*Yvirskrift*: *Vitjið Føroyar*

# 1 Stórasystir

- Greina og tulka myndina
- Sig søguna, sum tú sært í myndini



Sigrun Gunnarsdóttir (fødd 1950). Stórasystir, 2008

**At hava í huga, tá ið tú greinar og tulkar eina mynd:**

- tað, sum tú veitst um myndina
- myndaslag (málningur, fotomynd, viðgjørd mynd, lýsing el.a.)
- hvussu myndin er skipað (t.d. forsýni, miðsýni og baksýni)
- innihald (hvat sæst á myndini)
- persónar, kropsburður og samspæl
- sjónarhorn
- litir og ljós
- súmbol

# 2 Klædnastílur

- Ger viðmerkingar til viðtalið
- Eru aðrir spurningar, ið tú kundi hugsað tær at sett Katju?
- Hugleið um evnið klædnastílur.
  Tak m.a. hugtøkini endurnýtsla, merkjaklæði, bólkatrýst og mótarák við í tínar hugleiðingar
- Hví munnu nógv ung fólk – bæði gentur og dreingir – velja at ganga í endurnýtsluklæðum? Og man munur vera á klædnastíli á bygd og í Havn?
- Hvørjir fyrimunir og vansar eru við at brúka endurnýtsluklæði?

*Viðtal við unga gentu:*
*Lagt til rættis:*
*Alda Mohr Eyðunardóttir*

**”Eg gangi í klæðum hjá vinkonum, *genbrug* og *hand-me-downs*” sigur 16 ára gamla Katja Andersen - hygg at myndunum niðanfyri**

- *Hevur tað nógv at siga, hvussu tú sært út?*
- Ja, men tað er ikki tað, sum eg prioriteri hægst.
- *Hvar keypir tú tíni klæði?*
- Eg keypi øgiliga sjáldan klæði, men tá eg geri, so er tað *Asos*. Annars gangi eg í klæðum hjá vinkonum, *genbrug* og *hand-me-downs*.
- *Hvørjum kendum persóni hevði tú viljað fingið klædnaskápið frá?*
- Eg dugi ikki at velja eitt frá einum kendum persóni, klæði eru eitt sindur meira persónlig. Hevði heldur sjálv viljað valt mítt egna nýggja klædnaskáp!
- *Hvat kundi tú ongantíð funnið uppá at farið í?*
- Eina stramma blondublusu. Tað er uttan iva ljótasta plaggið, sum er uppfunnið.

*Røddin.fo, 1. september 2014*













*Blákrosshandilin í Havn er ein av mongu endurnýtsluhandlunum í landinum.*

Myndir: Roddin.fo

# 3 Ein heldur stutt stuttsøga

- Greina og tulka bloggin *Ein heldur stutt stuttsøga…*
  Sig tína hugsan um bloggin og um evnið
- Hvat heldur tú um yvirskriftina?
- Sig tína hugsan um tekstaslagið, og hugleið um, um nógv lesa slíkar bloggar

Eg sat í stóra, flotta kamari mínum, sum tey gomlu vildu sagt. Sat bara og bíðaði. Eg hevði bíðað leingi nú, men eg visti, at tað fór at henda.

Sjálvandi! hví skuldi tað ikki tað?

So leingi, sum eg hevði sitið her, var tað vorðið so heitt, men so kalt kortini. Eg frysti um tærnar, eg frysti innaní. Kortini var eg heit um allan kroppin. Eg var bangin. Tað nýggja sjónvarpið skein, tað nýggja, hvíta, blanka borðið skein við. Veggirnir vóru nýmálaðir. Familjan var í góðum hýri, tað legði eg merki til. Tað var eisini long tíð síðan, at hitt var hent.

Eingin tosaði um tað. Tað var gravað langt niður í likaminum, sjálvt um tað hevði knúst meg. Eg kundi ikki vísa tað, og eg dugdi heldur ikki. Eg kendi tað, eins og livdi eg í tveimum heimum. Men tey vildu hava meg í teirra. Tey vildu hava meg at vera glaða.

Hvat er tað? At vera glaður? Er tað yvirhøvur nakað? Eg skilti ongantíð, hvat tey meintu við. Tað einasta, ið tey gjørdu, var at ørkymla meg.

Eg varð brádliga illa fyri. Tað rann eftir arminum. Reytt, tjúkt, men kortini tunt.

Eg fyltist við haturskenslum. Hevði vaml, vildi spýggja.

Hataði!

Skeinur vóru um allan armin, um øll beinini, sum eg sat í nýggju undirklæðum mínum, sum nú vóru oyðiløgd.

Búkurin var heldur frægari.

Eg rann uppá. Eini so stór hús. Tey trúðu, at hesi nýggju, fínu húsini fóru at geva okkum eydnu og samanhald. Haldi, at eg flenti, tá ið tey søgdu tað. Eg rætti meg upp á hillina, tók mær eitt stórt plástur og ein saks. Nýtt, hvítt, formelt borð. Nýggir stólar. Nýtt gólv. Eg vildi spýggja, og eg hevði henda tankan um at mála alt við litum. Alt var vorðið so formelt, so nýtt, hetta var einki heim. Við hesum í huganum rann eg bara niðurundir aftur við saksinum og plástrinum, ið eg hevði tikið av hillini.

Eitt, og eg taldi tvey, og eg taldi trý. Tað ringasta var burtur nú. Nú var tað eisini myrkt, kalt, og eg hoyrdi regnið sníkja seg spakuliga inn í hesa køldu vetrarnáttina. Kalt í kamarinum, kalt innan í mær, kalt alla staðni.

Eyguni orkaðu ikki at halda sær opin longur, eg gjørdist troytt.

Mín yndissangur kom frá MTV, úr mínum nýggja sjónvarpi, og eg fór at gráta. Eg skríggjaði. Eg orkaði ikki at skríggja. Eg brast, eg græt, eg rópti. Tað rann úr eygum mínum. Armarnir vóru ljótir, skræddir og særdir. Hvar vóru øll, hvar var alt? Hvar var mítt heim? Hví var eg ikki sterk nú, hví tók eingin ímóti mær. Fleiri hundraðtals spurningar, við fleiri hundraðtals ósvaraðum spurningum. Eg skræddi meg sjálva sundur, meira enn eg longu var. Eg sá gult, reytt, blátt og síðani svart.

Rúsurin hevði tikið í meg, sent meg inn í mína egnu verð.

Sum eg bløddi, sum eg græt, sum alt rann av mær. Mítt likam oyðilagt, mítt hjartað oyðilagt, eins og eg var oyðiløgd.

Kom onkur inn? Vónandi vónin. Tann, ið skuldi verja meg. Tann, ið eg hevði bíðað eftir skuldi koma. Tey, ið høvdu skapað meg, vóru inni í mínum heimi, mínari verð. Hesin larmurin, henda øðin, gjørdi tey svakan. Fótafetini komu nærri, føtur teirra rørdu mínar. Eg sá tey, svøk. Eg hoyrdi tey rópa. Tey róptu hart.

NEI!

Tey brúktu alla megi sína til at knúsa verð mína. Eg føldi tað, eg hoyrdi tað. Samanstoyturin av mær og megi teirra. Verð mín var knúst, og eg datt. Alt, ið eg hevði bíðað eftir. Alt, ið eg hevði vónað.

Sum eg lá har, vónaði eg, at tey sóu bókstavirnar “hjálp” á ørmunum, á búkinum og á beinunum. Tað var soleiðis, at eg dugdi at siga frá……..

NEI!

Tey brúktu alla megi sína til at knúsa verð mína. Eg føldi tað, eg hoyrdi tað. Samanstoyturin av mær og megi teirra. Verð mín var knúst, og eg datt. Alt, ið eg hevði bíðað eftir. Alt, ið eg hevði vónað.

Sum eg lá har, vónaði eg, at tey sóu bókstavirnar “hjálp” á ørmunum, á búkinum og á beinunum. Tað var soleiðis, at eg dugdi at siga frá……..

(tillagað) http://skravnid.blogspot.dk/, febr. 2013

**Í tíni viðgerð skalt tú m.a. hugsa um:**

- tema / evni
- tíð
- persónslýsingar
- huglag
- myndamál
- mótsetningar
- høvuðsboðskap
- endan



**Ein bloggur – at blogga.... (*teld.*) loggur ella dagbók á heimasíðu, stytting fyri orðið *weblog.* Sprotin.fo**

Lýsingin av orðinum er breið. Ein bloggur er m. a. ein netdagbók, har tú við jøvnum millumbili skrivar um títt lív og tær upplivingar, tú hevur. Í mótsetning til vanligu dagbókina, ið er persónlig og helst væl goymd í eini skuffu, eru onnur, ið lesa tað, tú skrivar og hava høvi at siga sína hugsan um tað, geva tær afturmeldingar.
Ein bloggur er eisini ein háttur at kunna familju, vinir og kenningar um ymsar hendingar, ið tær eru fyri og sum hava týdning fyri teg.
Bloggur verður eisini nýttur til at skriva tankarnar niður og á tann hátt fáa kjak við onnur um tað, ið kanska ørkymlar ella fyllir hugaheimin.
Nógv blogga eisini um ymisk samfelagsviðurskifti, t.d. politikk, mentan, bøkur o.a.

# 4 Býarmyndir

- Greina og tulka yrkingina *Ishøj in memoriam*
- Sig í stuttum, hvat teksturin ”Býarmyndin” er um. Hvat leggur høvundurin serliga dent á?
- Skriva hvørji serlig eyðkenni eru í báðum tekstunum
- Heldur tú, at samfelagið ger nóg mikið til tess at hjálpa fólkum, ið koma soleiðis fyri sum persónarnir í hesum báðum tekstunum? Grundgev!
- Um tú hevði møguleikan, hvat hevði tú gjørt, sum kundi bøtt um støðuna hjá hesum fólkum?

## Ishoy in memoriam

Úti er novemberkalt. Her er fjálgt
í hesum deyðans spildurnýggja skála,
loftið og bróstið og kistan alt er hvítt
og gudiligt, og gólvið er málað.

Vit syngja gravsálmar, dusa okkum
í veldugum orðum um undirgongd og sigur,
tað prikar undir húðini, tá vit hugsa um teg,
sum í dag vit skulu grava niður.

Og her verður røðað – fyri fyrstu ferð –
um teg og lív títt, um pláss í himmiríki,
um góðsku og kærleika, sum nú einaferð
teir hálshvítu røða yvir líki.

Fátæki vinur, sjáldan læst tú so fjálgt
sum inni her í tíni hvítu kistu,
einsamalli vinur, sjáldan var so nógv fólk
savnað uttan um teg. Eg vildi, at tú visti.

Eg vildi, at tú kundi komið stetlandi inn,
skjálghentur, við prukku, í slitnum, svørtum frakka,
við vatnbláu, sorgblíðu eygum tínum,
sum oftani tú sást um stræti fjakka.

Og farið yvir til teir, sum taka synd í tær
í dag og sagt við tínum gamlamannamáli:
“Nú kunnu lata vera tit at taka synd í mær,
nú ikki meir um tykkar tún eg váli.

Hvat kenna tit til einsemi menniskjans,
til svongd og kulda, langar nætur
í vøku, í angist; tit sum altíð lógu trygt
í heitum songum, mettir og latir.

Væl veit eg, at oftast eru sjálvgjørdar
menniskjans torgongdu leiðir;
men eitt lítið vet av góðsku ger so vælsignað og gott
hjá tí, sum ongan – ongan – góðan eigur.

Eg boðin var, sum tit, til lívsins gestaboð
í lukku, í ljósi átti part eg;
men mangan – áh so mangan – havi á kvøldi
inn í tykkar ljósu, stongdu stovur start eg.

Eg stetlaði um stræti í regni og í sól,
tit góvu mær ei part í tykkar heimum;
sjálvt tykkar børn flentu, tá eg
– tápulingur – vildi nærkast teimum.

Nú liggi eg væl sum aldrin áður,
nú skal um allar ævir eg sova.
Farið heim – nú er seint – har bíðar eftir tykkum
ein kvinna, eitt barn og ein stova.”

*T.N. Djurhuus.* Úr *Yrkingar, 1978*

# Býarmyndin

**Hugleiðing frá Unn Danielsen um eina síðu av samfelagnum, vit menniskju hava lyndi til at skúgva til viks.**
**Røddin, kvf.fo 3. apríl 2014**

Brádliga vaknar hann, helst er hann avdottin kvøldið fyri. Klokkan gongur til sjey, og fyrstu bilarnir súsa fram við honum. Ørkymlaður setist hann upp undir seg, kennir eina djúpa pínu frá rygginum upp ímóti nakkanum, helst er tað harði bonkurin, ið er orsøkin. Gleðin birtist í eygum hansara, tá hann sær myrku glasfløskuna, hann tekur um kalda fløskuhálsin, men kastar hana síðani frá sær, so glasbrot fara í allar ættir; hon er tóm.

Enn ein dagur er komin; ein annar fíggindi. Aftur skal hann berjast ímóti hundasjúku, kulda og svongd. Aftur skal hann síggja køldu eygnabráini frá fólkum, ið eru betri enn hann. Aftur skal hann kenna seg útistoyttan og einsamallan.

Tunglyntur og einsamallur situr hann á beinkinum, hvørs kuldi er ein stingandi pína. Hann hoyrir eina skúlaklokku ringja nærindis; fyrsta fríkorter. Nú plaga fleiri av hansara slag at koma spákandi oman ímóti býnum, men enn er eingin teirra at síggja. Hann vónar so inniliga, at onkur teirra hevur eina fløsku av sterkum við sær, so hann fær tamt goyggjandi hundin í sær. Ein sigarett hevði eisini verið heilt góð.

Stirdur bíðar hann, einsamallur í miðbýnum, sum í hesi løtu eins væl kundi verið New York. Hann kennir seg einsamallan, einsamallan í heiminum. Ongan góðan hevur hann, ongan, sum veitir honum eina hjálpandi hond, tá ið á stendur, hann hevur einki annað enn slitnu klæðini. Onkuntíð kennir hann seg væl, men hóast alt - ikki rættiliga viðurkendan av umheiminum. Hann plagar at skáka sær undan um fýra tíðina, tá bilarnir við barnafamiljum koyra fram við honum. Eygnabráini, ið tey kasta honum, týna hann, drepa hann. Øll hava sæð hann áður, men eingin teirra kennir hann rættiliga. Hann er ein býarmynd, sum onkursvegna er fullkomiliga óynskt av samfelagnum. Frosin og útistoyttur reikar hann runt í frystakøldu Havnini.

*Unn Danielsen*



Mynd: Unn Danielsen - Roddin.fo

# 5 Vitjið Føroyar



- Greina og tulka filmin
- Sig tína hugsan um filmin og hugleið um, hvønn týdning slíkir filmar hava

Í tíni viðgerð skalt tú m.a. hugsa um:

- hvat endamálið er við filminum
- hvør er sendari og móttakari
- hvørjar søgur filmurin lýsir
- hvussu huglagið er
- hvussu tónleikur verður nýttur í filminum
- hvørjar málsligar snildir vera nýttar
- hvussu myndir og tekstur samsvara
- hvussu filmurin røkkur sínum endamáli



**Talgilt tilfar**